Jón Rói skoraði ímóti Brøndby

Føroyski landsliðsspælarin skoraði eitt av málunum í málríka dystinum ímillum AaB og Brøndby. Jón Rói og Súni noyddust tó enn einaferð av vøllinum sum taparar

SUPERLIGA

Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Jón Rói Jacobsen skoraði annað vikuskiftið á rað, og hesaferð var tað í rætta málið. Seinasta vikuskiftið var Jón Rói so óheppin at gera sjálvmál á heimavølli, men leygardagin gjørdi hann eitt av málunum hjá AaB í dystinum ímóti Brøndby.

Tað spældi tó einki serligt av hjá AaB, tí Brøndby vann dystin 4-3. AaB var ongantíð veruliga í nánd av at fáa nakað burtur úr dystinum, tí Brøndby hevði leiðsluna alla tíðina.

Fyrst kom Brøndby á odda 2-0, áðrenn AaB minkaði um munin. Síðani økti fyrrverandi AaB-spælarin Martin Ericsson upp í 3-1, áðrenn Jón Rói sló til. Eitt fríspark varð sent inn í Brøndby-brotsteigin, og har stútaði Jón Rói bóltin í málið hjá fyrrverandi liðfeløgunum hjá sær.

Brøndby svaraði aftur og skoraði til 4-2, áðrenn AaB eina seinastu ferð minkaði um munin til 4-3.

Súni Olsen kom á vøllin 10 minuttir eftir hálvleiksstøðgin, og hann loysti Allan Olesen av á vinstra bakki. Allan Olesen spældi sín dyst snummar 10, men var so óheppin at gera sjálvmál í júst hesum dysti.

AaB hevur framvegis ikki vunnið ein dyst, síðani superligan byrjaði aftur í síðsta mánaði.

Christan Holst spældi eina løtu

Christian Holst Lamhauge spældi ein hálvan tíma av dystinum hjá Lyngby ímóti Braband í donsku 1. deild sunnudagin. Dysturin endaði við javnleiki 1-1. Christian Holst Lamhauge, sum hevur spælt ein landsdyst fyri Føroyar, hevur verið skaddur fleiri vikur í ár, men nú er hann við at koma fyri seg aftur. Hann hevur eitt ár eftir av sáttmálanum við Lyngby.

Símun málkongur í Keflavík

Símun Samuelsen ger av álvara um seg á liðnum hjá íslendska felagnum Keflavík. Liðið hevur seinastu vikuna verið á venjingarlegu í Spania, og har hava teir spælt tríggjar venjingardystir. Fyrst spældi Keflavík ímóti spanska liðnum Recreativo Huelva og vann 2-1. Annað málið gjørdi Símun Samuelsen. Síðani spældi Keflavík javnleik 1-1 ímóti Aymonte, og ta ferðina skoraði Símun ikki. Hinvegin var hann tvær ferðir upp á spæl, tá ið Keflavík spældi triðja venjingardystin, sum var ímóti Breiðabliki og vann 4-2. Símun skoraði tvey av málunum hjá Keflavík.

Todi fekk ikki hol á

Todi Jónsson var sendur á vøllin, tá ið tað restaðu 20 minuttir av dystinum hjá Start ímóti Lyn í gjár. Hetta var fyrsti dysturin í norsku landskappingini í ár, og Start royndi at fáa sigursmálið í dystinum. Men hóast vandamikli føroyski álopsspælarin kom inn, eydnaðist tað ikki Start at skora, og dysturin endaði 0-0. Sambært heimasíðuni hjá Start hevði liði uppiborið at vinna dystin, tí Lyn hevði lítið at bjóða, og Start var við yvirlutan alla tíðina.

Teir í Sundalagnum eru í støtinum

Í Suðuroy tykist standa so illa til í fótbóltinum, sum tað ikki hevur gjørt øll tey árini, sum tað neyvan nakrantíð áður hevur gjørt

FORMULADEILDIN

2. UMFAR
Jóannes Hansen

Aftur hesa ferð eydnaðist tað at spæla í øllum fimm plássunum. Leygardagin og fyrrapartin sunnudagin sá annars einki út í fleiri støðum. Í Fuglafirði høvdu teir avlýst, men so komu kontraboð, og í Klaksvík ruddaðu teir vøllin við maskinum. At vesturættin loysti høgættina av hjálpti sjálvandi væl upp á støðuna.

Fótbóltsdygdirnarerusjálvandi ikki komnar í hæddina so tíðliga á árinum. Málini verða søgd at vera krúnan á fótbóltsundirhaldinum, og um tey verða nýtt sum mátisnórur, so var 2. umfar í bestu deildini áhugavert. 22 mál vórðu skorað ella 4,4 í miðal í hvørjari uppgerðini. Tað er rættuliga høgt miðaltal.

Fótbóltshugurin hevur nógvu tey seinastu árini verið framúr í Sundalagnum, og nú er hýrurin á EB/Streyma viðhaldsfólkunum so góður sum ongantíð áður. Tað er sagt á hesum síðum, og tað kann gott endurtakast. EB/Streymur hevur spælaragrundarlag til at vera við í stríðnum um heiðursmerkini og meistaraskapin. Spurningurin er, um teir fara at hava marginalirnar við sær í tøttu uppgerðunum, og tá ið tað fer at ráða um skaðar og leikbann.

Undanfarnu árini hava teir ikki havt hepnið á sínari síðu, tá ið teir hava spælt móti sigursvanda HB í Gundadali. Sunnudagin gjørdu teir í EB/Streymi enda á keðiligu hagtølunum, sum søgdu, at teir ikki høvdu skorað mál og harvið sjálvandi ikki vunnið móti HB í Gundadali. EB/Streyma liðið og viðhaldsfólkini eru í støtinum! Bara teirra lið og meistararnir í B36 hava fulla úrtøku. Longu nú eru fleiri farin at tosa um toppuppgerðirnar millum B36 og EB/Streym. Tað er sjálvandi møguleiki fyri, at stigatalvan fer at síggja øðrvísi út 7. mai, tá ið B36 fer at fáa vitjan av EB/Streymi, men talan verður undir øllum umstøðum um rættuliga áhugaverda uppgerð, tá ið EB/Streymur aftur skal í Gundadal, har teir sunnudagin staðfestu fyri sær sjálvum, at tað ber til hjá teimum at vinna.

NSÍ vísti sítt format, tá ið teir rystu skelkin av sær, sum tað mundi vera, tá ið VB/Sumba á Vágs eiði legði seg á odda og fekk brotsspark. Og hitt felagið í Runavíkar kommunu, Skála, vísti í Klaksvík, at tað eisini skal roknast við teimum í ár. GÍ hevur ofta staðið seg væl á Svangaskarði. Aftur hesa ferð fingu teir stig. Javnleikur á útivølli er at liva við hjá GÍ, meðan tað eigur at kennast tungt hjá B68, sum næstu vikuna skal spæla móti NSÍ (ú) og Skála (h).

Fuglfirðingar hava havt tað tungt í fyrstu umførunum. Skráin er einki vinarlig móti ÍF. Í fyrstu umførunum hava teir spælt móti havnarfeløgunum, og Skírisdag skulu teir norður á Mølina. Tað er troystarleyst einki stig at hava fingið. Fuglfirðingar halda tó, at hugburðurin var væl betri hesa ferð, enn hann var í Gundadali. Eftir vitjanina á Eiði verða fleiri avbjóðingar á skránni, sum fara at vísa, hvør dugur er í ÍF. Tá skulu teir spæla móti KÍ (h), GÍ (ú) og ikki minst móti VB/Sumba á heimavølli.

Onga staðni eigur fótbóltslagið at vera verri enn í Suðuroy. Har hevur gongdin verið syndarlig. Í bestu deildini hevur VB/Sumba einki stig fingið og málmunin 2-8. Í næstbestu deildini eru VB/Sumba, TB og Royn millum fýra tey aftastu. Samlaða úrtøkan er 0 stig við málmuninum 1-24! Støðan er sjálvandi eisini avleiðing av veika fólkagrundarlagnum. Á aðalfundinum leygarkvøldið var álvarin viðgjørdur í Hvalba, har teir hava mist heilt nógv fólk. At teir gjørdu av at fara at tosa við hini feløgini í oynni um at leggja saman er væl skiljandi.

Skírisdag verður spælt soleiðis í FORMULA DEILDINI: EB/Streymur-ÍF, GÍ-HB, NSÍ-B68, Skála-VB/Sumba og B36-KÍ. 2. páskadag sær skráin í 4. umfari soleiðis út: HB-NSÍ, ÍF-KÍ, EB/Streymur-GÍ, VB/Sumba-B36 og B68-Skála,